**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til EM í Open Water 2025

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi úttøkuskipan til EM í Open Water 2025, sum verður í Stari Grad á Hvar í Kroatia hin 28. til 31. mai 2025.

Úttikin verða 3 konufólk og 3 mannfólk við aldur til hesa stevnu, sum landsliðs-samskipari og starvsnevnd meta fara at kunna umboða okkum væl, í 4x1500 frí kappingini á hesi stevnu.

Svimjararnir eiga so vítt gjørligt at hava royndir við kappsvimjing á sjónum.

Hartil eiga tey síðan 1. september 2024 at hava klárað hesar trygdartíðir á langgeil, sum ásettar av World Aquatics til HM í Open Water 2025, á viðkomandi teini:

| Kvinnur | Teinur | Menn |
|---|---|---|
| 22:30.00 | 1500m | 21:30.00 |
| 01:20:00.00 | 5km | 01:15:00.00 |
| 02:45:00.00 | 10km | 02:30:00.00 |

Tíðirnar á 5 og 10km eru óviðkomandi, uttan so at svimjarar ætla at royna seg á hesum teinum.

Aldursmarkið til hesa stevnu, er sum ásett av European Aquatics, at vera í minsta lagi 14 ár.

Starvsnevndin hevur her tikið út eyka svimjarar, ífall at onkrum berst frá á staðnum.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2025, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 1. september 2024, til og við 26. apríl 2025 (Swim Open Tórshavn).

Sí annars "Reglugerð um úttøku og kravtíðir":
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða SSF um teir svimjarar sum í kravtíðarskeiðnum hava klárað kravið til hesa stevnu, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS